

Bergtóra Høgnadóttir Joensen

# Tannapínan hjá teim veikastu

Meðan vit kunnu fegnast um, at tannheilsan hjá føroyskum børnum er batnað munandi, er framvegis eingin tannlækni á landssjúkrahúsinum. Áður er víst á, at tey sum verða rakt av hesum eru: Sálarsjúk, fólk við menningartartarni, børn, sum hava tørv á serkønari tannlæknaviðgerð og fólk sum hava fingið stráluviðgerð í høvd ella háls.

Flestu okkara eru paff av støðuni. Gjørdist ikki minni paff av svarinum frá heilsumálaráðharranum tá eg setti honum skrivligan fyrispurning um málið. Hann sigur: "Roynt hevur verið at leitað eftir yngri tannlæknum.... higartil hevur ikki eydnast at fáa nakran at vísa starvinum nóg stóran áhuga"

### Størv SKULU lýsast

Almenni setanarpolitikkurin sigur púra greitt, at øll almenn størv skulu lýsast leys. Skilagóðar mannagongdir eru enntá festar á blað, sí lsh.fo

Tískil undrar tað stórliga, at tannlæknastarvið á landssjúkrahúsinum ongantíð er lýst leyst. Svarið hjá heilsumálaráðharranum vísir greitt, at almenni setanarpolitikkurin ikki verður fylgdur í hesum førinum. Við tað at fyrrverandi tannlæknin fór frá vegna aldur, skuldi verið lagamanni og ríkur møguleiki at orða eina starvslýsing saman við tannlæknanum, meðan hann enn var á landssjúkrahúsinum.

### Løgi svar

Skilji ikki, tann partin av svarinum sum snýr seg um, at 'roynt hevur verið at leitað eftir yngri tannlæknum' Hvat merkir tað? Hava hesir verið til samrøðu? Eru teir uppringdir? Fingið starvslýsing sendandi? Hvør hoyrir til bólkin yngri tannlæknar? Hvussu hevur leiðslan roynt at skapt áhugan?

### Eingin áhugi?

Heilsumálaráðharrin sigur í svarinum, at tað ikki er eydnast, at fáa nakran at vísa starvinum nóg stóran áhuga. Hvussu kann hetta staðfestast uttan at starvið er lýst leyst? Og um so er, at leiðslan hevur verið í samband við so nógvar yngri tannlæknar, sum ikki eru áhugaðir, er áhugavert at vita, hvør orsøkin er til at tannlæknarnir takka nei. Ov møtimikið? Lønin? Einsligt? Væntandi starvslýsing?

Hesir spurningar verða settir heilsumálaráðharranum, tá munnligu fyrispurningarnir aftur eru á skrá. Skilji snøgt sagt ikki framferðina í hesum málið – og hvussu er støðan júst nú, hjá teimum sum hava brúk fyri tannlæknanum á landssjúrahúsinum?

Helen MacDonald
*ein stúrin og vónsvikin pensjónistur*

# Politikarar skulu eisini spara

Nú eru politikarar fúsir at skera inn á bein, mest hjá teimum veiku. Vit skulu øll spara, men eg havi enn einki hoyrt um sparingar har hjá tykkum, so her eru nøkur sparutiltøk, sum rakar tykkum politikarar:

1) Politikarir fara 5-10% niður í løn.
2) Ferðafrádrátturin verður tað sama sum hjá Palleba.
3) Aðalráðini verða minkaði munandi. Somuleiðis vera færri stjórar og leiðarir.
4) Politikarir gjalda sjálvir fyri síni pensjón. Tað mugu øll onnur.
5) Loft verður lagt á alla ferðing. Telefonin og internetið er uppfunnið!
6) Sendistovurnar skulu niðurleggjast.
7) Ikki fleiri tænastustørv.
8) Síðst men ikki minst mongdin av landstýris/løgtingsmonnum skulu hálverast. Her er eingin stýring, bert klandur og kludur alíkavæl.

Alt Føroya fólk vil óivað hoyra um hesi tiltøk vera sett í verk? Um ikki, so grundgeving fyri hví ikki? Eitt skip kann bert útbyggjast til eitt vist áðrenn tað koppar.

# Nøvn

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
ið sýndu samkenslu, tá ið góða mamma,
og omma okkara

**Juline Sofie Joensen**
**vanliga nevnd Lina**
**Skála**

andaðist og varð jarðað.

Hjartaliga takk fyri alla góða hjálp í sambandi við jarðarferðina.
Takk til sangarar, berarar og kirkjutænarar
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til Bergur Debes Joensen fyri góð orð í kapellinum.
Takk til Símun Jacobsen fyri góð orð, tá kistan kom í Skála kirkju og til jarðarferðina
Takk til Sambýlið á Skála, fyri at tit vóru so góð við hana.
Takk til Landssjúkrahúsið fyri tíðina, hon var har.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á fold.
Gud signi tykkum øll.

**Familjunnar vegna**
***Magnus, Høgni, Jóan Jákup við familju***

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum hjálptu til og komu við troystarríkum orðum, tá okkara kæri maður, pápi og abbi

**Jens Kjartan Matras**

andaðist og varð jarðaður.

Eisini takka vit øllum teimum, sum vóru um hann, hansara seinastu tíð, bæði í heiminum og á sjúkrahúsinum.

**Takk fyri sýnda samkenslu**
***Kona og børn við familjum***



## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi,
tá okkara elskaði sonur

**Levi Splidt Johansen**

doyði og bleiv jarðaður.

Tøkk til tær óteljandi hendur, sum stuðlaðu okkum, øll tit, sum vóru um okkum og hjálptu til í hesari okkara sváru tíð.

Tøkk øll tit, sum sendu peningagávu til Trivnaðargrunnin fyri Sjúklingahotellið.

*Harrin gav*
*Harrin tók*
*Harrans navn veri lovað*

**Familjunnar vegna**
***Jórun og Asberg***

**Bindimaskinutreff**

**5. og 6. novembur verður bindimaskinutreff í Glæmuni í Kvívík**

**Tilmelding á tlf 227701**

**Bygdarfelagið Glæman**